ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Dagf.: 26. apríl 2023
Mál: 23/09341-5
Viðgjørt: HP

Viðv. løgtingsmáli nr. 84/2022 um mótrokning í pensjón

Í sambandi við løgtingsmál 84/2022 um mótrokning av pensjón hevur Løgtingsins trivnaðarnevnd sent Almanna- og mentamálaráðnum hesar spurningar:

1. Hvussu ávirkast inntøkur frá skatti og avgjøldum, um pensjónistar arbeiða meira?

2. Hvat kostar tað at hækka markið fyri mótrokning til ávikavist 60.000 kr., 80.000 kr., 90.000 kr. og 100.000 kr.?

Til nr. 1 – hvussu ávirkast skattainntøkur, um pensjónistar arbeiða meira?
Hjá meginpartinum av pensjónistunum hevur ein hækking av markinum fyri mótrokning onga ávirkan á hugin at arbeiða meira. Hjá nøkrum pensjónistum kann ein hækking hava við sær, at hugurin gerst betri at arbeiða eitt sindur meira.

Við eini hækking av markinum fara allir pensjónistar, sum hava árliga inntøku hægri enn 45.000 kr., at fáa hægri pensjón - eisini uttan at arbeiða meira. Men tað er bara hjá einum lítlum parti, at tað fer at løna seg betri at arbeiða.

Ein pensjónistur, sum hækkar sína arbeiðsinntøku úr t.d. 100.000 til 110.000 kr., fær neyvt tað sama burturúr meirinntøkuni uttan mun til, um markið fyri mótrokning er 45, 60 ella 100 tús. kr. Effektiva marginalskattaprosentið er óbroytt hjá øllum, sum hava inntøku hægri enn ta upphædd, sum markið verður hækkað til. Tað merkir, at pensjónistur, ið økir um sína inntøku við 10.000 kr., altíð hevur gott 4.000 eftir, tá skattur og heilsutrygdargjald er trekt frá, og tá pensjónin er lækkað – líkamikið hvat markið fyri inntøku er.

Hugsa vit okkum at markið verður hækkað úr 45 upp til 60 tús. kr., so fær pensjónisturin meira burturúr hvørjari tjentari krónu upp til 60 tús. kr. Hækkar markið enn meir, so fær pensjónisturin skilligt tað meira burturúr. Alt tað, sum pensjónisturin tjenar útyvir markið, verður ikki ávirkað.

Almanna- og mentamálaráðið hevur fingið fyribilshagtøl um inntøkur hjá fólkapensjónistum í 2022. Tað er onki í hagtølunum, sum bendir á, at pensjónistar leggja seg eftir at arbeiða upp til 45 tús. kr. fyri síðani at steðga við at arbeiða.

Um lóggávan verður broytt soleiðis, at arbeiðsinntøka ikki verður mótroknað yvirhøvur, tá er tað sum kunnugt altíð ein figgjarligur fyrimunur hjá pensjónistum, sum arbeiða meira. Men tað ber ikki til at meta um í hvønn mun, tað fær pensjónistar at arbeiða meira og harvið, hvussu inntøkur frá skatti og avgjøldum verða ávirkað. Um pensjónisturin velur meir frítíð fram um inntøku, so fer hann kanska at arbeiða minni fyri somu løn, nú hann hevur meiri eftir fyri sama arbeiði.

Til nr. 2 – hvat kostar tað at hækka markið fyri mótrokning?
Almanna- og mentamálaráðið hevur við støði í fyribilshagtølum fyri inntøkur hjá pensjónistum í 2022 leysliga mett um kostnað fyri landskassan av at hækka markið fyri mótrokning.

Um markið fyri mótrokning hækkar, so hækka útreiðslur til fólkapensjón leysliga mett soleiðis:


- Inntøkumark á 60 tús. kr.: kostnaður uml. 5,5 mió. kr.
- Inntøkumark á 80 tús. kr.: kostnaður uml. 11 mió. kr.
- Inntøkumark á 90 tús. kr.: kostnaður uml. 13,5 mió. kr.
- Inntøkumark á 100 tús. kr.: kostnaður uml. 16 mió. kr.

Upphæddirnar í metingunum eru bruttoupphæddir. Veitingarnar, sum hækka eru lutvíst skattskyldugar, og ein partur kemur sostatt aftur til land og kommunur. Fyri pensjónistar í gomlu pensjónsskipanini er tað skattskylduga viðbótin, ið hækkar. Hjá pensjónistum í nýggju pensjónsskipanini er tað fyrst skattafría grundupphæddin, sum hækkar og síðani viðbótin. Umleið 30 % av mettu upphæddunum omanfyri koma innaftur í skatti – umleið helvt um helvt til ávikavist land og kommunur.


Sum nevnt omanfyri fer ein hækking av markinum fyri mótrokning at hava við sær, at allir pensjónistar, sum hava inntøku hægri enn 45.000 kr., fara at fáa hægri fólkapensjón. Myndirnar niðanfyri vísa, hvussu nógv pensjónin hækkar um árið, tá markið fyri mótrokning hækkar til ávikavist 60, 80, 90 og 100 tús. kr.

Myndin skal lesast soleiðis, at x-aksin er inntøka, sum er afturat fólkapensjón (t.v.s. inntøkugrundarlagið, sum pensjónin verður roknað eftir). Y-aksin vísir hækking av fólkapensjón. Verður markið t.d. hækkað til 100 tús. kr., tá hækkar fólkapensjónin hjá persóni við inntøku á 400 tús. kr. við 13.750 kr. árliga.

Ógiftur fólkapensjónistur í nýggjari pensjónsskipan – fólkapensjón ísv. broytt mark fyri mótrokning



Ógiftur fólkapensjónistur gomul pensjónsskipan – ávirkan á fólkapensjón ísv. broytt mark fyri mótrokning



Myndirnar omanfyri eru galdandi fyri ógiftar fólkapensjónistar. Fólkapensjónin hjá giftum pensjónistum fer at hækka við somu upphæddum, tó at x-aksin verður eitt sindur styttri. T.v.s., at fyrimunurin hjá giftum er burtur við eitt sindur lægri arbeiðsinntøku (ella aðrari inntøku).

Fyrivarni fyri meting av kostnaði av at hækka markið á 45 tús. kr.
Metingarnar um kostnað fyri landskassan skulu takast við fyrivarni, fyrst og fremst tí metingin byggir á fyribilshagtøl fyri 2022, og nakrir pensjónistar eru ikki liðugt álíknaðir enn.

Við verandi marki á 45 tús. kr. er fólkapensjónin fult mótroknað, tá onnur inntøka er uml. 540 tús. kr. Verður markið á 45 tús. kr. hækkað, flytur upphæddin fyri fullari mótrokning seg samsvarandi uppeftir. Tað kann hava við sær, at nøkur velja at fáa fólkapensjón heldur enn at útseta pensjónina. Metingin omanfyri tekur ikki hædd fyri, at pensjónistar í minni mun fara at útseta pensjónina.

Hagtølini fevna um inntøku hjá hvørjum einstøkum pensjónisti, men nakrir giftir pensjónistar hava valt at verða mótroknaðir saman við sínum hjúnafelaga. Fyri hesar pensjónistar er metingin óneyv.

Almanna- og mentamálaráðið

Heri Petersen
fulltrúi